Føroya arbeiðsgevarafelag:

Vilja seta á stovn Arbeiðsrætt

Føroya arbeiðsgevarafelag vil ikki hava tað sitandi á sær, at tær nýta Fútarættin til órættvíst endamál. Hetta skyldast heilt einfalt, at tað ikki er nakar arbeiðsrættur í Føroyum, skrivar Vinnuhúsið. Gunnleivur Dalsgarð, formaður fyri Starvsmannafelagið, er alt annað enn samdur

ARBEIÐSMARKNAÐUR
Heri á Rógvi

Fútarætturin skal í framtíðini ikki vera tað staðið, har træturnar á arbeiðsmarknaðinum skulu loysast. Hetta ynskja partarnir báðu megin borðið. Loysnin á trupulleikanum er tó ymiskur fyri hvønn partin

Ósemjur millum partarnar á abeiðsmarknaðinum er ikki nakað óvanligt í Føroyum. Við jøvnum millumbili plaga verkfallini at vitja okkum sum ein onnur plága. Tað er ymiskt, hvussu leingi verkføllini vanliga eru, men tað plagar at merkjast. Verkføllini taka tað tíð, sum tað tekur pørtunum at semjast.

Í sambandi tær seinastu ósemjurnar er fútarætturin eisini komin upp í leikin. Eitt nú í trætuni um ambulansutænastuna kom fútarætturin upp í málið, og hetta fekk fakfelagsleiðararnar at geva ilt av sær. Í hesum førinum eins og í øðrum førum gjørdi fútarætturin arbeiðssteðgin ólógligan. Tískil noyddist arbeiðsfólki aftur til arbeiðis, uttan at tey ynsktu tað.

Stjórin fyri Vinnuhúsið er farin at skriva um at seta á stovn ein arbeiðsrætt í Føroyum.

Arbeiðsrættur

Eftir seinastu træturnar á arbeiðsmarknaðinum, so vóru tað fyrst fakfelagsleiðarir, sum tóku til orðanna. Teir hildu tað als ikki vera nakað gott hugskot at blanda fútarættin upp í tílík mál, tá ið hetta als ikki hevði verið siðvenja áður. Eisini funnust teir at Fútarættinum fyri ikki at taka alt málið til viðgerðar, men bert at viðgera partar av málinum til fyrimuns fyri annan partin – teirra mótpart.

Nú hevur eisini Føroya arbeiðsgevarafelag gjøgnum Vinnuhúsið komið við nøkrum úttalilsum í hesum sambandi.

Føroya arbeiðsgevarafelag vísir á, at tað í løtuni ikki er nakar arbeiðsrættur í Føroyum, og av teirra orsøk er Fútarætturin ella Føroya rættur noyddur at viðgera málið. Hetta er fyri so vítt ikki nakað nýtt sjónarmið, og hevur spurningurin viðvíkjandi arbeiðsrættinum verið frammi áður. Føroya arbeiðsgevarafelag er sjálvt heldur ikki nøgt við støðuna sum hon er.

–Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at sett verður gongd á orðaskiftið um og fyrireiking av stovnsetan av einum føroyskum arbeiðsrætti. Eitt er í hvussu so er vist, og tað er, at so leingi eingin føroyskur arbeiðsrættur er stovnsettur vil Føroya Rættur (harundir fútarætturin) eisini vera »arbeiðsrættur« í Føroyum. Sostatt avgera fakfeløgini í stóran mun sjálvi hvussu leingi Føroya Rættur (harundir fútarætturin) framhaldandi skal vera »arbeiðsrættur« í Føroyum, skrivar Vinnuhúsið.

Føroya Arbeiðsgev-arfelag sóknast eftir øllum at døma eftir einari skipan, sum er mestsum álík teirra skipan,ið danir nýta nú.

– Sambært dómspraksis er á føroyska arbeiðsmarknaðinum galdandi ein friðarskylda meðan ein kollektivur sáttmáli er galdandi.Við at gera kollektivan sáttmála tryggjar arbeiðsgevarin sær sostatt arbeiðsfrið í sáttmálaskeiðinum. Nevnast kann eisini, at galdandi er ein tulkingarfyrimunur fyri arbeiðsgevaran soleiðis at tulking arbeiðsgevarans fyribils skal leggjast til grund til rættaravgerð fyriliggur, skrivar Vinnuhúsið.

Víðkaðan gerðarrætt

Sum vera mann í tílíkum spurningum, so er mótparturin mestsum púrasta ósamdur. Hóast Gunnleivur Dalsgarð ikki plagar samráðast so øgiliga nógv við partarnar á privata arbeiðsmarknaðinum, so heldur hann ikki nógv um uppskotið hjá Føroya arbeiðsgevarafelag, sum hann metur kann fáa kollveltandi týdning fyri føroyska arbeiðsmarknaðin.

– Føroya arbeiðsgevarafelag veit fult væl, at ein arbeiðsrættur ikki er nakað, sum fakfeløgini kunnu taka undir við, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Sum heild metir Gunnleivur ikki at tað er neyðugt við einum tílíkum arbeiðsrætti, sum vit eisini kenna úr Danmark. Hann heldur, at tað eru partarnir í einari arbeiðstrætu, sum sjálvir skulu loysa trupulleikan, soleiðis sum teir eisini hava gjørt áður. Harafturat skilur Gunnleivur Dalsgarð als ikki, hvat tað er fyri trupulleikar, sum Føroya arbeiðsgevarafelag eftir øllum at døma sær.

– Vit hava saman við øðrum nú í eina tíð arbeitt við einari ætlan um ein víðkaðan gerðarrætt, men hetta hevur seinastu tíðina ligið á láni. Hetta er ein loysn, har partarnir sjálvir kunnu skipa ein stovn, sum kann loysa tílík trætumál, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur seg vera til reiðar at tosa við Føroya arbeiðsgevarafelag og onnur, um hesar spurningarnar, men ein arbeiðsrættur er ikki nakað,ið hann teir kunnu taka undir við.

Menas svarar aftur:

Kanningin er vísindalig

John Christensen, sum hevur staðið á odda fyri kanningini hjá Menas um Føroyar sum oljuland, er ikki í iva um, at kanningin hjá teimum er vísindalig, hóast Suni á Dalbø vil vera við nakað annað. Eisini Hjarnar Djurhuus frá BP ivast ikki í, at hetta er eitt gott vísindaligt verk

KANNING
Heri á Rógvi

John Christensen, sum stóð á odda fyri verkætlanina fyri Menas, heldur kanningina hjá teimum vera vísindaliga

Suni Dalbø var einaferð knýttur at Menas kanningini, men hann gjørdist so mikið ónøgdur, at hann tók seg burturúr. Nú sigur hann kanningina vera óvísindaliga

Tað var í Útvarpi Føroya mánakvøldið, at Suni á Dalbø kom framat mikrofonini í sambandi við tað so kendu Menas frágreiðingina, sum er skrivað við tí fyri eyga at lýsa Føroyar sum eitt komandi oljuland. Kanningin kallast fyri A Study of The Impact of The Development of Hydrocarbon Resources on The Faroe Islands. Sum heitið sigur so er talan um eina kanning í orðsins rætta týdningi. Til at hjálpa sær við kanningini fingu Menas fólkini samstarv í lag við Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og samfelagsdeildina. Teir skuldu so í felag taka sær av kanningini. Tá kanningin varð løgd fram varð hon eisini løgd fram sum um, at hetta hevði verið ein verkætlan, har allir partar vóru nøgdir, men hetta er nú sáaur ivi um.

Vísindaligt

Í teirri áður umtalaðu tíðindasending segði Suni Dalbø seg als ikki vera nøgdan við verkætlanina. So mikið, at hann kendi seg noyddan at fara burturúr arbeiðinum, tá ið arbeiðið ikki var nóg mikið ella als ikki vísindaligt.

Hann fór eisini so mikið langt sum at siga, at Fróðskaparsetri valdi at selja seg til eina bretska fyritøku við hesari kanningini.

Tað var John Christensen, sum stóð á odda fyri verkætlanini. John Christensen er sjálvur úr Jersey er víðagitin sum serfrøðingur innan fyri búskap hjá smærru samfelagum. Hann er nógv knýttur at Menas. Tá vit ringdu til hansara, so segði hann seg ikki kenna nakað til, at Suni Dalbø skuldi vera ónøgdur við hesa kanningina hjá teimum. Í kanningini nýtir Menas fleiri víðagitnar serfrøðingar á mongum økjum.

– Eg kann í veruleikanum ikki siga so nógv, tá ið eg ikki havi sað nakað skrivligt frá Suna Dalbø. Hann var við í verkætlanini fyri Fróðskaparsetur Føroya, men hann tók seg síðani úr. Ein og hvør kann fara í útvarpi at tosa, men eg havi ikki sað nakað skrivligt, sigur John Christensen.

Hann leggur afturat, at teir bygdu kanningina á vísindaligar arbeiðshættir og hava eisini tikið vísindalig fyrivarni.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Maluni Marnersdóttir, rektara á Fróðskaparsetri Føroya, ella Jógvan Mørkøre, sum eisini luttók í verkætlanini fyri Fróðskaparsetur Føroya.

Nýggja góðshavnin hevur skund

Tað er neyðugt at fáa vinnuna at samstarva við kommununa í einum partafelag, so góðshavnin í Ánunum kann gerast liðug, árenn undirsjóvartunnilin kemur um Lorvíksfjørð, heldur Jógvan við Keldu

ÚTBYGGING
Eyðun Klakstein

Góðshavnin í Ánunum skal verða ein partur av samstarvinum millum Klaksvík og eystaru síðu av Eysturoynni, tá undirsjóvartunnilin kemur um Lorvíksfjørð. Tí hevur arbeiðið skund, heldur Jógvan við Keldu

Klaksvík: Góðshavnin í Ánunum skal vera liðug, tá undirsjóvartunnilin kemur um Lorvíksfjørð.

Tað heldur Jógvan við Keldu, býráðslimur í Klaksvík og fyrrverandi borgarstjóri. Í farnu viku var hann framsøgumaður hjá Fólkflokkinum, tá fyrsta viðgerð av málinum um Norðoyatunnlinum var fyri í løgtinginum.

- Skal hetta lata seg gera, so er neyðugt, at vinnan og kommunan samstarva í einum privatum partafelagi, sum kann standa fyri arbeiðnum í Ánunum, sigur Jógvan við Keldu.

Seinnu árini hevur Klaksvíkar kommuna fylt út í Ánunum, og hetta arbeiðið skal halda fram 1. januar. Trupulleikin hjá kommununi er ferð eftir ferð íløguloftið, og tað er tað eisini í sambandi við havnina í Ánunum. Tað kunnu bara brúkast avmarkaðir pengar til hetta arbeiðið, um onnur øki í samfelagnum skulu byggjast út samstundis.

Avskipa fyri alt økið

Jógvan við Keldu heldur, at arbeiðið í Ánunum hevur skund, tí góðshavnin má verða klár at taka í nýtslu, tá undirsjóvartunnilin kemur um Lorvíksfjørð, og tað roknar hann fer at verða um eini fýra ár.

Tí kundi eitt partafelag, har kommunan og vinnan vóru við, gjørt arbeiðið skjótari.

- Klaksvík hevur ein stóran møguleika at gerast avskipingarhavn fyri eitt dynamiskt og spennandi øki, sum millum annað umfatar Klaksvík, Lorvík, Gøtu og Fulgafjørð. Tá undirsjóvartunnilin er komin, verður tað ein stórur fyrimunur at avskipa góðs úr Klaksvík, heldur enn at koyra tað ein longri tein til onkra aðra havn, heldur Jógvan við Keldu.

- Men tað er umráðandi, at Klaksvík fyrireikar seg til hendan møguleika. Vit skulu greiða skipafeløgunum frá okkara ætlanum, samstundis sum góðshavnin verður gjørd.

Gamalt samstarv tikið uppaftur

Jógvan við Keldu sær stórar møguleikar fyri samstarvið millum Klaksvík og eystara part av Eysturoynni.

- Vit hava eitt fjølbroytt og gott vinnulív í hesum øki, og tá undirsjóvartunnilin kemur eri eg sannførdur um, at vinnan, handilslívið, mentanarlívið og ítróttarfeløg fara at samstarva nógv meira, enn tað verður gjørt í dag. Gamla samstarvið fer at verða tikið uppaftur, heldur hann.

Sum dømi um samstarv nevnir Jógvan við Keldu møguleikan at samantvinna arbeiðið hjá kommunulæknunum, Klaksvíkar Sjúkrahús kann aftur veruliga gerast sjúkrahús hjá teimum, sum búgva á eystursíðuni av Eysturoynni, og møguleikar eru við spennandi útbygging á ítróttarøkinum. Harafturat vera tað bara 25 minuttir millum Klaksvík og oljuhavnina í Runavík, og har sær hann góðar møguleikar hjá Klaksvíkini at vera við í eini komandi oljuvinnu.

- Tað hevur nógv at siga fyri klaksvíkingar at fáa fast samband um Lorvíksfjørð, men tað hevur ikki minni týdning fyri eystara part av Eysturoynni, heldur Jógvan við Keldu.

Stórar broytingar

Tá uppskotið til anleggslóg um Norðoyatunnilin var til fyrstu viðgerð í løgtinginum í farnu viku, var breið undirtøka fyri hesa ætlan.

Seismiskar kanningar eru gjørdar í Lorvíksfirði, og nú er málið, at arbeiðið at gera undirsjóvartunnilin skal bjóðast út næsta summar, so arbeiðið kann byrja á heysti í 2002.

- Við einum undirsjóvartunnli fara vit at fáa eitt nýtt økissamstarv, sum fer at skapa stóran framburð í økinum, heldur Jógvan við Keldu.

- Føroyska samfelagið fer eisini at broytast nógv longu við undirsjóvartunnlinum um Vestmannasund. Møguleikarnir fyri at ferða bæði innanlands og uttanlands fer at økjast munandi, og eg rokni við, at flogførini í framtíðini fara at flúgva soleiðis, at tú kanst fara til Danmark á morgni og koma aftur á kvøldi uttan stórvegis trupulleikar, sigur Jógvan við Keldu.

Hann stúrir ikki fyri, at heimbýur hansara gerst ein sovibýur, tá fasta sambandið er komið.

- Um tað verður soleiðis, so eru vit heilt einfalt ikki nóg dugnalig. Royndirnar á Akranesi í Íslandi, sum er í líknandi støðu eru sera góðar. Har hevur fast samband veruliga skapt framburð á øllum økjum.

Grækaris vitjar í Klaksvík

Grækaris D. Magnussen

Klaksvík: Grækaris D. Magnussen fer mikudagin at vitja í Leikalund í Klaksvík, har hann fer at signera nýggju bók sína, Horvin føroyingur.

Bókin hevur verið nógv umtalað, síðani hon kom út, og líkt er til, at hendan umtala hevur skapt stóran áhuga fyri bókini.

Grækaris vitjar í Leikalund mikudagin frá klokkan 15.00 til 17.00.

Miele
VASKA Á FYRSTA FLOKKI
VIÐ MÍELE
TURKITRUMLA T490
Elektronisk styring
Hell emaljerað
Orkuflokkur C
fyrr 8.995,-
7.595,-
VASKIMASKINA W865
1300 sn./min.
Orkuflokkur A
Vaskiflokkur A
Sentrifugeringsfl. B
Hell emaljerað
Ein knaps program
fyrr 11.795,-
9.995,-
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30 • www.hth-koker.com